# Ped. stuðul í Stranda skúla

Søkt verður eftir 1 stuðli at arbeiða alt skúlaárið 2008/2009.

Einum stuðli til næming í 1. flokki 22 tímar um vikuna.

**Søkt verður eftir stuðli, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og vera fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Førleikakrøv:**
Tann, ið verður settur í starv, skal helst hava námsfrøðiliga útbúgving ella samsvarandi førleika. Fyrimunur er eisini, um umsøkjarin hevur royndir at arbeiða við næmingum við serligum tørvi.

Um umsøkjari við námsfrøðiligari útbúgving ikki søkir, kann hjálparfolk verða sett í starv.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v., avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera skúlastjóranum,

Hans Petur Jacobsen,
Strandatún 17,
490 Strendur,

í hendi **í seinasta lagi mikudagin 4. juli 2008 kl. 16.00.**

Fleiri upplýsingar um størvini fært tú við at ringja til skúlastjóran, Hans Petur Jacobsen, tlf. 474042 ella tlf. 232740.

**Stranda skúli** hevur komandi skúlár um 200 næmingar og um 23 lærarar. Tú kanst lesa meiri um skúlan á heimasíðuni www.skulin.fo/str

Runavíkar Kommuna

## DAGRØKTARAR til Runavíkar Kommunu

Runavíkar kommuna søkir eftir dagrøktarum til dagrøktarskipanina í Runavík at byrja eftir summarferiuna.

Í Dagrøktarskipanini eru 70 børn og 16 dagrøktarmammur

**Vit bjóða**
eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv, har tú ført hollan stuðul frá kommunalu skipanini.
Dagrøktarar hava tilknýti til Spælistovuna, sum m.a. fyriskipar felags tiltøk í Barnalonini og Ítróttarhøllini.
Í dagrøktini eru børn í aldrinum 0 – 5 ár.

**Vit ynskja at**
- tú hevur royndir dagstovnaøkið
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- ert virkin og hevur lætt við at samstarva
- hevur hug og áræði at skapa umstøður har børnini gleðast, trívast og mennast

**Setanarviðurskifti**
Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf. 44 85 94 ella 22 85 94

**Umsókn**
Skrivlig umsókn skal verða Dagrøktini í hendi í seinasta lagi 9. juli 2008.

**Dagrøktarskipanin í Runavíkar Kommunu**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139 · FO-600 Saltangará

MIÐVÁGS KOMMUNA

## søkir DAGRØKTARA

til Dagrøktarskipanina í Miðvágs Kommunu, at ansa børnum frá 0-3 ár.

**Tann ið sett/settur verður skal:**
- Hava góðar umstøður, at hava børn, bæði inni og uttanfyri.
- Taka ábyrgd og kunna arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísa virðing fyri børnunum, foreldrum og starvsfeløgum.
- Verða álítandi og hava góð samstarvsevnir.
- Verða tolin og duga at vísa/geva umsorgan.
- Hava hegni og áhuga í at menna børnini.
- Duga at sýggja møguleikar í staðin fyri forðingar.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 33 29 60 ella 218429 millum kl. 8.00 og 16.00 og tosa við Rósely Reynstind, dagrøktarleiðara.

**Umsøknarfreist:**
9. juli 2008, kl. 12

**Lønar- og setanartreytir:**
Setanarøkið er Miðvágs Kommuna. Tann, ið sett/settur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsmannafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya (KAF)

Starvið verður sett frá 11. august 2008.

**Umsóknin skal sendast til:**

**Miðvágs Kommuna**
Dagrøktarskipanin
Jatnavegur 2
FO-370 Miðvágur

# Innrammingar

áðrenn summarfrítíðina

Vit hava stongt í viku 29 frá 14/7 til 19/7. Myndir, ið skulu verða lidnar áðrenn summarfrítíðina, mugu latast okkum skjótast gjørligt.

**GLARSMIÐJAN**
**– alt innan innramming**

**Glarsmiðjan · Dr Jakobsensgøta 7**
**100 Tórshavn · tel: 31 06 23 / 21 66 23**

# Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan stongd frá 3. juli 2008. Opið verður aftur 11. august 2008 kl. 10.00.

NES SÓKNAR SJÚKRAKASSI
FO-620 Runavík




Sosialurin -har tað hendir




Í Tórshavnar kommunu eru fimm hýruvognsloyvi leys at søkja.

Vísast skal á, at sambært grein 8 í reglugerðini um hýruvognsstøðir í Tórshavnar kommunu, skulu umsøkjarar hava váttan fyri, at teir koma at koyra frá støð. Trý loyvi eru tengd at bilstøðini Auto, og tvey loyvi eru tengd at bilstøðini Bil Mini Taxi.

Umsóknarblað fæst í Snarskivuni. Umsóknir skulu vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi hósdagin 10. juli 2008.

Tórshavnar kommuna